# Stórur bindiklubbi í Vestmanna

**Seinasta leygarkvøld savnaðust yvir 130 bindiklubbakonur til hugnakvøld í Vestmanna. Tað var Vestmanna kirkjukór, sum skipaði fyri hugnakvøldinum**

HUGNAKVØLD
*Solby A. Eliasen*

Um hetta hugnakvøldið í Vestmanna skal lýsast stutt, so kann ikki annað sigast enn, at 130 konur flentu í kíki alt kvøldið.

Lagt varð upp til eitt av teimum heilt góðu hugnakvøldunum í miðhøllini í Vestmanna skúla. Borðini vóru vakurt dekkað og matskráin bjóðaði upp á fiskasúpan og ís omaná.

Erla Olsen er kórleiðari, og hon sigur, at tá tey fóru at hugsa um, hvat tey skuldu eta, tá hugsaði hon við sær sjálvari, at altíð er tað kjøt ella salat.

– Tí helt eg, at ein fiskasuppa hevði verið minst líka góð, og tað vísti seg eisini at verða vælumtókt, sigur hon.

Tað vóru ikki bara konur úr Vestmanna í skúlanum hetta kvøldið. Tær komu eisini úr Havn og úr Kvívík. Og tær fingu hugna og látur fyri allar pengarnar.

Martin Joensen var har og sang nakrar av sínum kendu sangum. Eisini høvdu fyrireikararnir útvegað sær bindiklubbasangir úr Suðuroy og Norðoyggjum, og tað varð sungið av øllum lívsins kreftum.

Mitt í øllum fór Erla upp á pallin og segði, at nú fóru tær at fáa vitjan av einum bindiklubba uttanífrá. Hon segði seg onki kenna til tær, og at tær høvdu ikki teknað seg til. Og so byrjaðu tær at koma ein og ein, júst sum tá konur hittast til ein vanligan bindiklubb. Men tað vardi ikki longi, fyrr enn láturin var um at fáa takið á skúlanum upp frá. Tí beinanvegin sást, at hetta vóru menn ílatnir kjólar og parykk.

Teirra framførsla av einum bindiklubba var sera góð. Og til tíðir hoyrdist nóg illa, hvat teir søgdu, tí konurnar flentu so nógv og hart.

Men har var nógv lokalt skemt, og uppaftur skemtiligari fyri konurnar av tí sama.

– Tað var sera stuttligt at hoyra menninar tosa okkara bindiklubbaprát um eitt nú, hvussu torført tað er at sleppa út hetta eina kvøldið um vikuna til bindiklubb, tí menninir eru so nógv úti, greiðir Erla frá og flennir so hjartaliga samstundis.



*130 konur vóru til bindiklubbahugnakvøld, sum var í Miðhøllini í Vestmanna skúla*
*Mynd: Birgir W. Høgnesen*



*Ein heldur óvanligur bindiklubbi kom á vitjan. Tað vóru nakrir menn, sum høvdu latið seg í konufólkaklæðir og parykkar. Láturin mundi ongan enda fingið*
*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

## Afturvendandi

Bindiklubbakonurnar í Vestmanna hava hits einaferð fyrr, men tá var tað so gott sum bara í Vestmanna. Hesuferð vóru konur úr Havn og úr Kvívík eisini við. Og harafturat vóru eisini pensionistar bodnir við eisini.

– Eg hugsaði við mær sjálvari, at tað tykist sum tað ongantíð er nakað skemtiligt fyriskipað fyri pensionistunum. Altíð eru tað fyrilestrar ella okkurt líknandi. Men eg meini so við, munnu pensionistarnir ikki hava fingið ov mikið av fyrilestrum gjøgnum alt lívið? Tey skula eisini sleppa at flenna og stuttleika sær, og tað gjørdu tær eisini, tað er púra vist, greiðir Erla frá. Og hon heldur fram, at ein teimum hevði sagt við seg aftaná, at so nógv hevði hon ikki flent alt lívið, og hon fór helst heldur ikki at flenna so nógv aftur.

So Erla og hinir fyriskiparararnir kunnu fegnast um, at allar konurnar lótu avbera væl at kvøldinum.

– Eg kann ímynda mær, at hetta kann fara at verða eitt afturvendandi tiltak. Vit hava í øllum førum longu fingið fleiri áheitanir um at skipa fyri onkrum líkandi aftur longu í heyst, men nú fáa vit at síggja, sigur Erla Olsen at enda.

# Heitar pylsur, meðan tit bíða

**Fyri stuttum kom ein pylsuvognur at standa við síðuna av ferjuleguni í Leirvík, har fólk, sum bíða eftir bátinum, hava kunnað keypt sær eitt hvørt lætt at eta**

PYLSUVOGNUR
*Solby A. Eliasen*

**Leirvík:**
Er ein staddur í Leirvík og ikki sleppur við ella er ov seinur til Ternuna, so nýtist einum ikki at ganga svangur á Leirvíkskei og mala. Tí nú er ein pylsuvognur komin á keiina, sum er opin ávísar tíðir á degnum. Hann liggur næstan fastur í ferjuleguni, so ikki er langt at ganga, um ein gerst svangur í bíðitíðini, sum til tíðir kann gerast drúgv. Í pylsuvogninum selja tey franskar hot-dogs, pyslur við breyð, pizza og sodavatn eisini.

Tað er jugoslavin Velko Gjrgjirski, sum eigur pylsuvognin. Hann og kona hansara fluttu til Føroyar fyri umleið einum hálvum ári síðani. Tey hava búð í Leirvík og arbeiða bæði á fiskavirki. Frammanundan búðu tey í Danmark.

– Tá vit búðu í Danmark, bleiv eg forelskaður í pylsuvognunum av hesum slagnum, sum ein sær nógvastaðni í Keypmannahavn. Eg havi ongantíð beinleiðis arbeitt í einum pylsuvogni, men nú fái eg meg so royndan, sigur Velko, sum lat pylsuvognin upp fyri eini góðari viku síðani. Hann og konan skiftast um at arbeiða har, men Velko sigur, at um undirtøkan heldur fram við at vera líka góð, so fara tey at royna at fáa onkra gentu at arbeiða eisini.

– Vit hava jú eitt arbeiði sum er, og vit kunnu ikki vera í báðum støðum í senn. Eisini hevði tað lætt eitt sindur um hjá okkum, sigur hann.

Pylsuvognurin er komin niðri frá, og Velko sigur, at hann vildi hava júst ein tílíkan, tí honum dámar teir so væl.

– Vit hildu, at tað var so líka til at stilla pylsuvognin har, tí har eru jú ofta svong fólk, sum bíða, sigur Velko. Hann letur væl at gongdini og sigur, at tey selja nógv.

Serliga førararnir á teimum størru bilunum, sum onkuntíð noyðast at bíða upp í fleiri túrar, eru fegnir um pylsuvognin, sum hevur opið frá klokkan 11 til 15 og 17 til 21. Men Velko leggur at enda afturat, at hann hevði kunnað hugsað sær havt hann opnan longri. Men so má eyka fólk til.

Í øllum førum, so hava fólk nú tveir møguleikar at velja í, meðan tey bíða í Leirvík. Tey kunna antin fara niðan á Statoilstøðina, ella tey fara til pysluvognin á keiini at keypa.



*Jugoslavin Velko Gjrgjirski hevur latið pylsuvogn við ferjuleguna í Leirvík upp. Hann letur væl at undirtøkuni og sigur, at tey selja nógv*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



# Rundur dagur á Konmansmýru

**Í dag kunnu Vøggustovan og Barnagarðurin við Konmansmýru í Havn halda 20 ára dag. Dagurin verður hildin á stovninum**

FØÐINGARDAGUR
*Solby A. Eliasen*



*Elsebet Bolstad, leiðari á Barnagarðinum og Hannibeth Dam, varaleiðari í Vøggustovuni her avmyndaðar saman við børnunum*
*Mynd: Jens K. Vang*

Dagurin verður sum sagt hildin í dag, leygardagin. Har verður opið hús, og øll eru hjartaliga vælkomin, verður sagt frá Konmansmýru.

Tey hava fyrireikað henda dagin í langa tíð nú saman við børnunum. Tey hava verið úti í náttúruni og heinta steinar, bløð, gággur og ymiskt annað, sum tey so hava nýtt til prýði á stovninum í samband við stóra dagin.

Bæði vøggustovan og barnagarðurin halda dagin saman, hóast tað er dagurin hjá Vøggustovuni. Dagurin hjá Barnagarðinum verður ikki fyrr enn í juli.

- Vit hildu, at tað var líka gott at halda dagin saman, tí vit eru jú í sama bygningi, og samstarvið millum okkum er avbera gott. Og harafturat er juli so keðilig tíð, tí tá eru so mong í feriu, sigur Elsebet Bolstad, leiðari av Barnagarðinum. Hon hevur starvast á stovninum í 12 ár, harav tey sjey, sum leiðari. Og tað er nakað sum eyðkennir henda stovnin, at starvsfólkini hava verið har í langa tíð.

- Nú er tað soleiðis, at Vøggustovan í veruleikanum er nógv eldri. Tað var Nancy Bjørklund sum saman við Birthe Toftagarð byrjaðu vøggustovuna yviri við Strond í 1965, og hevur hon so virkað síðani. So hon er farin um tey 35 árini. Men tað eru so 20 ár, síðani vit byrjaðu her, greiðir Elsebet frá.

Varaleiðarin á Vøggustovuni Hannibeth Dam hevur starvast har í 35 ár í septembur. Fleiri av starvsfólkunum hava starvast har millum 15 og 20 ár. So alt bendir á, at talan er um eitt gott arbeiðspláss.

Tey vænta nakað av fólki, tí tað gjøgnum árini hava verið so mong, sum hava gingið har. Summi eru enntá foreldur í dag, sum hava gingið í vøggustovuni. Og tað kundi verið avbera stuttligt hjá teimum at vitja teirra gamla stovn og síggja gomul bløðútklipp.

- Vit hava havt ein so avbera góðan og dugnaligan skrivara. Hon hevur verið ófør at goyma útklipp úr bløðunum, gomul sum nyggj, so nú savna vit alt saman og heingja tey fram til sjálvan dagin, sigur Elsebet, sum gleðir seg til dagin.

Tilsamans 96 børn ganga í vøggustovu og barnagarði á Konmansmýru.

# Føroyskt Heimavirkið stongt

**Heimavirkið í Vágsbotni er nú stongt. Nevndin hevur gjørt av at lata aftur, tí ikki kann haldast fram, sum gongdin hevur verið tey seinastu sjey árini**

MVG-SKIPAN
*Solby A. Eliasen*



*Føroyskt Heimavirkið í Vágsbotni er nú stongt, tí nevndin metir ikki, at handilin fer at kunna venda skeivu gongdini, sum er komin orsakað av MVG lógini, sum sigur, at eisini sjálvsognarstovnar eru MVG skyldugir*

Handilin er stongdur, tí ikki hevur verið møguligt at rikið hann uttan hall seinastu sjey ella átta árini.

– Føroyskt Heimavirkið hevur havt eitt hall upp á tilsamans yvir 800.000 krónur frá 1995 til og við ársenda 2001. Endaliga uppgerðin fyiri 2002 er ikki gjørd enn, men vit vænta, at hallið verður nakað tað sama, siga tey frá Heimavirkinum.

Men tey leggja dent á, at Heimavirkið er ikki farið á húsagang. Men við verandi gongd, so meta tey ikki, at handilin hevði megnað at borið seg í nógv meira enn fýra ár afturat. Og tískil hevur nevndin tikið avgerð um, at pengarnir heldur skulu nýtast til okkurt annað endamál. Og tað verður at geva bøkur út.

Í brævið, sum Føroyskt Heimavirkið hevur sent út til fjølmiðlarnar, verður sagt, at Heimavirkinum kann ikki vera lívið lagað, sum nú er. Tað kemur fyrst og fremst av meirvirðisgjaldinum. Føroyskt Heimavirkið selur bert handvirkaðar vørur, og tí hevur handilin onki inngangandi MVG, men bert útgangandi. Og tað vil siga, at t. d. fimta hvør króna, sum kemur í kassan skal latast landskassanum.

Vøran, sum Føroyskt Heimavirkið keypir, kemur fyri tað mesta frá pensionistum, sum hava verið avbera glað fyri at hava hetta at takast við. Men nú er tað so farið í søguna - fyribils í øllum førum. Og MVG, sum verður lagt afturat, dýrkar vøruna uppaftur meira, og tað hevur samstundis havt við sær, at sølan í handlinum er minkað niður í eina helvt. Tað eru sostatt høvuðsorsøkirnar til skeivu gongdina seinnu árini.

Tey hava roynt ymiskar vegir at fáa hjálp til at avtaka MVG skylduna hjá øllum heimavirkjum í landinum, men tað letur ikki til, at nakað er komið burturúr.

Tí í øllum førum eru heimavirkini í landinum framvegis MVG skyldug. Frá Heimavirkinum verður sagt, at tað sigur seg sjálvt, at um ikki politikararnir ikki broyta hesa MVG lógina fyri hesa gomlu føroysku handarbeiðsmentan, so fer hon fyri bakka.

– Og er hon fyrst farin, kemur hon ikki aftur, siga tey.

Nevndin í Føroyskt Heimavirkið sigur, at tey hava ikki orku til at fáast við hetta málið longur, og tey harmast støðuna. Tey siga, at tey hava nú koyrt í hesum málinum í yvir átta ár, og nú er orkan uppi, og handilin stongdur.

Heilt fitt av vøru, sum Heimavirkið hevur goldið fyri, liggur framvegis á goymslu. Hvat fer at henda við vøruni, vita tey ikki at siga, men tey halda ikki, at tað kann vera rætt, at Heimavirkið fer at hava útsølu.

– Vit hava ongantíð havt útsølu, og vit fáa okkum ikki til at fara at hava føroysk hondgjørd skjúrt til tjóðarbúna okkara á útsølu. Tað minkar nógv um virðingina fyri tí megnar arbeiði, sum liggur aftan fyri eitt tílíkt skjúrt, verður at enda sagt frá Heimavirkinum.